FØROYA KÆRUSTOVNUR

Fylgiskjal 10

Tórshavn: 11. september 2018
Málstal: 18/00088
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: AH/ge

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Hoyringsviðmerkingar**

Víst verður til skriv tykkara frá 13. august 2018, har uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, broyting í løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum og broyting í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd verða send til hoyringar.

Vart skal gerast við, at vit avmarka okkara viðmerkingar til kærugongdina.

Eftir uppskotunum er ætlanin at víðka heimildarøkið hjá Kærunevndini í lendismálum til at fevna um náttúru- og umhvørvismál soleiðis, at eisini avgerðir sambært náttúrumargfeldislógini, náttúrufriðingarlógini, umhvørvisverndarlógini og havumhvørvisverndarlógini skulu kunna kærast til Kærunevndina í lendismálum.

Í dag er Kærunevndin í lendismálum mannað við einum løgfrøðingi, einum landmálarakønum og einum byggikønum og snúgva flestu kærumálini seg um bygging, matrikulering og sundurbýti.

Í sambandi við omanfyri nevndu lógarbroyting er ætlanin at víðka nevndina við tveimum limum soleiðis, at hon verður ein fimm mannað nevnd. Nýggju limirnir skulu vera ávikavist náttúru- og umhvørviskønir.

Eftir okkara meting hevur Kærunevndin í lendismálum teir førleikar, sum skulu til fyri at viðgera tey mál, sum eru fevnd av málsøki hennara í dag. Tørvur er ikki á náttúru- og umhvørviskønum limum fyri at loysa hesi mál.

Tað verður heldur ikki mett neyðugt við landmálarakønum ella byggikønum til at viðgera kærur eftir t.d. náttúrumargfeldislógini ella havumhvørvisverndarlógini.

Soleiðis sum vit síggja tað, kemur henda nýggja nevnd tí at vera samansett soleiðis, at har altíð eru tveir limir, sum ikki eru neyðugir fyri viðgerðina, samstundis sum hesir hava avgerandi ávirkan á úrslitið, tí hvør limur hevur eina atkvøðu. Slík samanseting kann vera órógvandi í nevndararbeiði og kann hava neiliga ávirkan á verandi kærunevnd, sum er sera vælvirkandi.

UNDIR HORNABAKKA • POSTSMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • TELDUPOSTUR: FKS@FKS.FO

Eftir okkara meting hevði verið skilabetri at stovnsett eina nýggja kærunevnd at taka sær av kærunum á hesum økinum burturav. Eina nevnd har allir førleikar eru viðkomandi í øllum málum.

Harumframt skal nevnast, at okkara royndir eru, at nevndir við trimum limum roynast betri enn nevndir við fimm limum. Tað er ikki bert lættari at fáa í lag fund við trý heldur enn fimm fólk, kjakið sýnist eisini at verða betri.

Tí verður mælt til, at stovnseta eina nýggja nevnd at taka sær av hesum málum heldur enn at víðka kærunevndina í lendismálum. Ikki tykkum at siga, er tað Fíggjamálaráðið, sum skal góðkenna slíka samsýning, men fíggjarliga skuldi henda loysn ikki verið dýrari enn tann leistur, sum verður skotin upp. Okkara uppskot vildi verið, at tá talan er um nýggja nevnd, fáa nevndarlimirnir ikki fasta mánaðarliga samsýning, men fáa samsýning fyri hvønn fund og tá nevndin so hevur virkað eina tíð, ber til at endurskoða samsýningina og meta um hon er í samsvari við arbeiðsbyrðuna. Fær formaðurin t.d. kr. 2.500 og hinir báðir limirnir kr. 1.250 fyri fundin og talan verður um 10 fundir um árið, gevur hetta eina útreiðslu á kr. 50.000. Verður samsýningin sett til ávikavist kr. 3.000 og kr. 1.500 verður útreiðslan av sama fundartíttleika kr. 60.000 um árið. Hetta er ikki meira kostnaðarmikið enn tann loysn, sum verður skotin upp.

Í sambandi við samsýningina skal annars gerast vart við, at samsýning til nevndarlimir fer av játtanini hjá Kærustovninum og eigur hækkaða/nýggja samsýningin tí at síggjast aftur í okkara játtan.

Vinarliga

Føroya Kærustovnur

Anja Hovgaard, stjóri